# Føroyingar á mentanar- og róðrarstevnu í norðurtýsklandi

**Um eina viku verða nógvir føroyingar við á norðurlendskari stevnu í Slesvík í Norðurtýsklandi**

RÓGVING OG MENTAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í døgunum 6.–9. august verður ein stór róðrar og mentanarstevna í Slesvík í Norðurtýsklandi.

Samstundis er 1200 ára hald í søguliga staðnum, Hedeby, sum liggur beint við.

Hendan stevnan er fyriskipað í kjalarvørrinum á sera væleydnaðu róðrar- og mentanarstevnuni, sum var á Tvøroyri fyri tveimum árum síðani.

Ein av fyrireikarunum, Ólavur á heygum, sigur, at talan er um eitt norðurlendskt samstarv, sum eisini gongur tvørturum landamørk í Slesvík í Norðurtýsklandi, Annars eru hini norðurlondini eisini við.

Tað verður Joakim, prinsur, sum fer at seta stevnuna fríggjadagin 6. august, og tað skerst ikki burtur, at føroyingar fara at seta síni spor á stevnuni. Føroya Løgmaður, Jóannes Eidesgaard og Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri, skulu halda røðu á hátíðarhaldinum í sambandi við setanina.

Harafturat fara eisini Thorsten Dahl, borgarstjóri í Slesvík og Anne Lutkes, lógmálaráðharri, at halda røðu.

Tá ið stevnan verður sett, fara einir 10-15 føroyskir kappróðrarbátar at rógva framsýningarróður, sum endar í einum hálvmána inni í Kongeengen.

Seksæringurin av Tvøroyri, Naddoddur, fer at rógva fremst við tveimum trompetblásarum frammi í stavninum, har teir fara at spæla okkurt kent, føroyskt lag.



*Ólavur á Heygum í felagnum Tvørabátinum, er ein drívmegin á róðrar- og mentanarstevnuni*

Á setanarhátíðini fara eisini Tórshavnar Kamarkór, Húsakórið í Keypmannahavn og eitt kór í Slesvík, at syngja, eins og føroyskur danur verður á skránni.

At enda skal Guðrun Sólja Jacobsen eisini syngja fyri áhoyrarunum.

Somuleiðis er eisini ein føroysk listaframsýning á skránni.

Tað eru Ólavur á Heygum, sum er formaður í felagnum Tvørabátinum í Keypmannahavn, og Birgir Kuhl frá róðrarfelagnum í Slesvík, sum hava tikið stig til stevnuna.

Fyrireikararnir vóna, at hendan stevnan verður líka væleydnað sum tann á Tvøroyri í 2002, sum fekk nógva umrøðu í føroyskum og dosnkum fjølmiðlum, Eitt nú gjørdi danska TV 2 eina sending um stevnuna á Tvøroyri.

Eitt slíkt tiltak er dýrt, men tey hava eisini fingið góðan stuðul frá "A.P. Møller og Hustru Chastine MC-Kinney Møllers fond til Almenne Formaal", Maersk Air, Flogfelagi Føroya, Faroe Ship, Ferðaráði Føroya, Hotel Hafnia og Restorff`s Bryggjarí.

NETBANKIN

Útisetar



Við Netbankanum kanst tú sum útiseti framhaldandi røkja øll vanlig peningaviðurskifti ígjøgnum Føroya Banka, haraftrat ber til at hava samskifti við tín kundaráðgeva um teldupost.

Endamálið við Netbankanum er at gera tað lættari hjá tær at avgreiða tíni fíggjarviðurskifti.

Gjaldskort
Hevur tú gjaldskort FR-kort ella FR/Visa kort kann SU flytast beinleiðis inn á tína vanliga nýtslukonto í Føroya Banka, so tað er ikki neyðugt hjá tær at stovna konto í donskum peningastovni

Nýtslumøguleikar
- Kanna saldo
- Fáa yvirlit yvir bókingar, sum eru gjørdar á konto
- Flyta pening á konto í føroyskum, donskum ella grønlendskum peningastovnum
- Gjalda FI-kort, og melda gjøld til V&T og BS
- Stovna fastar flytingar til konto í føroyskum, donskum og grønlendskum peningastovnum
- Fáa yvirlit yvir bókingar, sum verða gjørdar
- Hava samskifti við kundaráðgevan um teldupost
- Senda lániumsókn

www.netbankin.fo

FØROYA BANKI



# Føroyskt mentanarlív í fullum blóma

**Tá ið Oddvá Nattestad setti ólavsøkuna, kom hon í røðu sín nógv inn á, hvussu ríkt mentanarlív, ið vit føroyingar eiga**

ÓLAVSØKUSETANIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Oddvá Nattestad hevur í mong ár sjálv verið virkin innan føroyskt mentanarlív, og serliga er tað innan sjónleikin, at Oddvá er vorðið eitt kent navn, og seinnu árini hevur Oddvá eisini verið nógv frammi í miðlunum í sambandi við starv sítt sum høvuðsfyriskipari av Listastevnu Føroya.



*Tað var navnframa Oddvá Nattestad, sum í dýrdarveðrinum ólavsøkuaftan setti ólavsøkuna framman fyri stórari mannfjøld á Tinghúsvøllinum*

*mynd: Álvur Haraldsen*

## Stór áhoyrarafjøld

Nógv fólk varð savnað við Tinghúsvøllin í góðveðrinum ólavsøkuaftan, og riðilin av ítróttarfólki í skrúðgonguni var eisini ein tann størsti, ið leingi er sæddur.

Oddvá legði fyri í røðu síni við at endurgeva eina yrking hjá Flóvin Flekk um myrkur og ljós, og hon segði, at nú ólavsøka er, er hetta eisini endin á øllum summarstevnunum, og tað merkir, at tað nærkast myrkari tíðum.

Somuleiðis kom Oddvá inn á ábyrgdina hjá teimum fólkavaldu, sum nú fara undir eitt nýtt tingskeið. Hon segði, at tað krevur politiska støðutakan, nú globaliseringin ávirkar okkara lívshættir.

## Ríkidømi í Føroyum

Eitt tað týdningarmiklasta, sum vit í Føroyum eiga, er, sambært Oddvá, ríkidømið í okkara fólki. Eisini kom Oddvá í røðu síni inn á tað ríkidømi, sum vit føroyingar eiga í okkara náttúru, havi, kristnalívi, list, vinnu og ítrótti. Hon segði í hesum sambandi, at tað er av stórum týdningi, at tey fólkavaldu geva hesum best hugsandi kor, soleiðis at hesin okkara dýrgripur ikki fúnar og forferst, men verður hildin vakur og glitrandi.

At okkara ítróttarfólk eisini hava gjørt vart við seg, er heldur einki dulsmál, og Oddvá nevndi í røðu síni stóra spenningin undan ólavsøkuróðrinum, og tey mongu góðu avrik, ið okkara ítróttarfólk hava megnað bæði her heima og uttan fyri landoddarnar. Millum annað nevndi Oddvá hondbóltskvinnurnar, sum fyrr í ár framdu eitt megnaravrik í Italia, eins og okkara flogbóltsmenn sum hava havt eitt gott ár.

## Blómandi listarlív

Eitt av hjartamálunum hjá Oddvá Nattestad er listin, og sjálvsagt átti hon eisini sín náttúrliga part av røðuni hjá Oddvá. Nógv av okkara fremstu listarfólkum umboða Føroyar kring allan knøttin, og at vit verða viðurkend sum listartjóð, sæst best við at síggja tey kendu nøvn, ið koma higar á listastevnu á hvørjum ári. Kendi enski rithøvundurin Fay Weldon var her í fjør, og í ár kom so mæt nøvn sum Kiri Te Kanawa og rokkbólkurin Jethro Tull. Oddvá helt, at tað ikki kann sigast annað, enn at nógv er broytt, síðani Doodle Bugs var tað stóra tónleikanavnið, ið vitjaði her á landi. Nú hava vit møguleikan at velja millum tey oman fyri nevndur og eitt nú Lisu Ekdahl.

Oddvá tosaði eisini eitt sindur um Ólavur Heilaga, og um korini hjá kvinnum. At enda írøðu síni kom Oddvá inn á tey mongu tiltøk, ið vóru at velja millum á ólavsøku. At vit hava tað gott í Føroyum, er Oddvá ikki í iva um, og hon endaði røðu sína við at siga, at vit eru heppin at búgva í Føroyum, har túsundtals fólk savnast í høvuðsstaðnum, uttan at eitt herlið av politistum noyðast at ansa eftir okkum.

FRÍ Í FØROYUM *Frælsi á súkklu*

SÚKKLA



SÚKKLA TEG SUNNAN

saman við familjuni
kopla úr á leiðini
Stundin er komin

*"Einki kann samanberast við ein túr á súkkluni".*
*(-John F. Kennedy)*

LOYSNIR 32 21 23

Ferðaráð Føroya

Suðuroyar Kunningarstova á Tvøroyri tel 37 24 80, Suðuroyar Kunningarstova í Vági tel 37 43 42/28 43 42, Sandoyar Kunningarstova tel 36 18 36/22 20 78, Kunningarstovan tel 31 57 88, Kunningarstovan í Saltangará tel 44 94 49, Kunningarstovan í Fuglafirði tel 44 48 60, Vága Kunningarstova tel 33 34 55, Norðoya Kunningarstova tel 45 69 39, Ferðaráðið tel 35 58 00

www.visit-faroeislands.com